# Børn byggja Le

## Kappingin hesaferð

Grundleggjandi í FIRST LEGO League, er at loysa nakrar uppgávur við einum LEGO robotti, sum næmingarnir sjálvir hava bygt, fingið at stýra har hann skal og loysa uppgávurnar. Men tað fylgir eisini ein onnur ástøðilig uppgáva við. Hesaferð er uppgávan um veðurlag. Undanfarin ár hevur tað millum annað verið um Suðurpólin, ferð til Mars og orku.

Ástøðiliga uppgávan er eisini býtt sundur. Talan er um tríggjar ymiskar partar. Fyrsti parturin, er at finna ein trupulleika í sínum nærumhvørvið, har veðurlagsbroytingarnar hava gjørt um seg. Hetta skulu liðini kanna um tað eru onnur støð í heiminum, ið hava sama trupulleika. Næsti parturin er at finna eina nýskapandi loysn, sum kann loysa júst henda trupulleika. Seinasti parturin er ein framløga, har næmingarnir sjálvir, á ein so áhugaverdan hátt sum gjørligt skulu greiða frá loysn teirra.

Í føroyska umfarinum eru 13 dómarar. Har ímillum eru til dømis, Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, Jóhan Dahl, landsstýrismaður og Kristian Davidsen, stjóri í Føroya Tele. Kappingin verður í Klingruni hjá Føroyar Tele í morgin og byrjar klokkan 10.00.

**Genius Green Team, ið er liðnavnið hjá sjeynda flokki á Eiði, skal luttaka í FIRST LEGO League. Tey hava góðar vónir til ástøðisligu uppgávuna, meðan robotturin er teirra veika øki. Lærarin metir tó, at hetta hevur verið ein góð læra hjá børnunum**



*Robotturin hjá Genius Green Team sær gott út, men hevur trupulleikar við stýringini*

ROBOTTAKAPPING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tú stendur á gólvinum í einum myrkum rúmi har Frankenstein hevði kent seg væl. Á gólvinum stendur eisini eitt borð, ið hevði verið sera hóskandi til at gera eitt ódjór sum tað hjá Frankenstein. Allar hugsanirnar eru partvís rættar, tí lív kann koma á borðið við eini kontakt. Á borðinum stendur ein robottur. Børn hava bygt hann og tey eru fyri stuttum farin heim.

Tá tú tendrar ljósið sært tú, at hetta er eitt kjallararúm. Hann er undir skúlanum á Eiði, og tilevning hevur hildið til har fyrr. Men seinastu mánaðirnar er rúmið nýtt at geva lív. At geva robottinum lív, ið skal til sína størstu avbjóðing í morgin. Tó hevur robotturin enn nakrar trupulleikar. Hann dugir nevniliga ikki ordiliga at venda, so tað kann geva honum trupulleikar til stóru avbjóðingina, har hann skal loysa eina rúgvu av uppgávum.

### Genius Green Team

Sjeyndi flokkur á Eiði hevur seinastu mánaðirnar arbeitt við FIRST LEGO League. Flokkurin kallar seg Genius Green Team og níggju eru á liðnum. Fýra dreingir og fimm gentur.

Sambært lærara teirra er hetta ein strævin og sera gevandi tilgongd.



*Børnini hava gjørt ein sang til kappingina*



*Tað skal nógv til at fáa eina flotta framløgu*